# Dreymaferðin handað

**I september og oktober mánaði høvdu vit í sjey vikuskiftisbløðum eina kapping, har tað ráddi um at svara ymsum spurningum um almenna vitan.**

Høvuðsvinningurin í kappingini var ein ferð fyri tvey við Norrønu, har vinnararnir sluppu at ferðast sum rættir millióningar. Glæsiliga suitan umborð á stóra ferðamannaskipinum stóð nevnliga klár til vinnararnar, og ikki nóg mikið við tí. Føroya Sparikassi hevði eisini latið vinnarunum 10.000 kr. í lummapeningi, soleiðis at ráðini skuldu verið til bæði eitt og annað á ferðini.

## Sum millióningar

Tá lutur varð drigin millum innsendu seðlarnar, var brævbjálvin hjá Súsonnu Jacobsen av Norðskála tann, ið fyrstur kom úr posanum, og mikudagin fekk hon so handa vinningin, tá Smyril Line og Føroya Sparikassi høvdu skipað fyri litlari samkomu.

Sjálv fekk Súsanna Jacobsen ikki verið til staðar, men drongur hennara, Niels Thomsen, sum sjálvur annar fer við á ferðini, legði leiðina til høvuðsstaðin, har hann slapp at taka móti stóra vinninginum.

Áki Jespersen helt vegna Smyril Line fyri, at hann var vísur í, at tey bæði fóru at fáa eina ógloymandi ferð.

- Eg havi sjálvur verið eina ferð við Norrønu, har mær untist at hava suituna, og eg má bara siga, at tað er nakað serligt. Tað er ein ferð, sum ikki stendur nakað aftan fyri tað, ið stóru cruise-skipini, sum ofta síggjast á Havnini, hava at bjóða.

Og Ólavur Jensen, marknaðarleiðari á Sparikassanum, tóktist eisini vera væl nøgdur. Eisini hóast hann altso mátti lata 10.000 kr. frá sær.

- Skal tú ferðast er tað umráðandi at tú tryggjar tær, at tú hevur pening tøkan á ferðini. Tað er hent at hava nakað av reiðum peningi í røttum gjaldoyra við á ferðini, og tað tryggjar Sparikassin so við hesum kekkinum, helt hann.

Og so er bara eftir hjá vinnarunum, at bíleggja sær tríggjar dagar umborð. Tríggjar dagar, har tey sleppa at ferðast sum rættir millióningar.

-jm




*Finn Thomsen her við kekki, blómum og gávubrævið. Menninir undir liðini á hepna vinnaranum eru marknaðarleiðararnir hjá ávíkavist Smyril Line og Føroya Sparikassa*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

ENDURLÝSING

Verkfrøðingur til vegadeildina

Við hesum verður søkt av nýggjum eftir verkfrøðingi ella líknandi til vegadeildina hjá Landsverki at seta sum skjótast.

Rætta fólkinum kunnu vit bjóða eitt spennandi og áhugavert starv, ið er fakliga og persónliga mennandi og við góðum arbeiðsumstøðum.

Arbeiðsuppgávur
Uppgávur, sum viðkomandi í høvuðsheitum kann rokna við at skula røkja og standa fyri:
• Gera ætlanir fyri trygdartiltøk
• Programmeringar, forkanningar, prosjektering og prosjektgransking
• Eftirlit við verkætlanum
• Myndugleikaumboðan

Førleikakrøv
Sóknast verður eftir verkfrøðingi ella fólki við aðrari viðkomandi útbúgving og helst við royndum innan omanfyri nevndu virkisøki.

Stórur dentur verður lagdur á góðar persónligar eginleikar, og rokna vit við, at viðkomandi er fyrikomandi, hevur góð samstarvsevni, dugir at skipa sítt arbeiðsøki og kann geva sítt íkast til menning av arbeiðsplássinum og er førur fyri at arbeiða sjálvstøðugt, eggja og ganga undan.

Setanarviðurskifti
Tænastustaðið verður skrivstovan í Havn. Løn og setanartreytir annars verða sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarandi yrkisfelag.

Umsóknir
Umsókn við prógvum og lívsgongdarlýsing (CV) verður at senda til:

Landsverk, Postboks 78
110 Tórshavn

og skal verða skrivstovuni í hendi í seinasta lagi 6. desember 2004. Merkið brævbjálvan "Verkfrøðingur til vegadeildina". Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

Nærri upplýsingar um starvið kunnu fáast frá Finnleifi Durhuus, leiðari av vegadeildini, á tel. 31 13 33, teldupostur: fd@lv.fo

Landsverk, Tinghúsvegur 5, Postsmoga 78, Tórshavn, | Tel 311 333, Faks 314 986, lv@lv.fo, www.landsverk.fo

LANDSVERK byggir land

www.sansir.fo

# Ákærdur fyri harðskap móti smádreingi

Seinasta mánakvøld máttu nakrir smádreingir ásanna, at teir vóru farnir dekan ov langt við skemti sínum. Ein bólkur av dreingjum gekk og stuttleikaði sær í Berjabrekku við at fremja ymisk smærri skálkabrøgd. Eitt nú við at banka upp á hurðar hjá fólki.

Í einum føri dugdi eigarin av eini íbúð tó ikki at síggja tað heilt stuttliga í hesm. Hann kom út eftir dreingjunum, og tó at teir flestu náddu at flýggja, so fekk maðurin fatur í einum teirra beint uttan fyri Mylnuna.

Somikið harðligur var maðurin við 14 ára gamla dreingin, at hesin eftir tilburðin hevur meldað fyri harðskap. Talan hevur ikki verið um beinleiðis fysiskan skaða, men drongurin kendi seg heilt illa kroystan, og hevur fingið ein ordans skelk. Og á løgreglustøðini verður sagt, at frágreiðingin hjá dreinginum er av slíkum slag, at løgreglan kannar málið, sum var talan um harðskapsmál.

Løgreglan hevur eisini tosað við mannin, sum skal hava framt harðskapin, men enn stendur orð móti orði, tí eingin annar hevur sæð tilburðin.

Av Politistøðini verður sagt, at tey fegin vilja hoyra frá fólki, sum møguliga hava sæð tilburðin seinasta mánakvøld. Sagt verður, at hendingin fór fram millum kl. 20.30 og 21.30, og at talan var um ein mann í 30'unum, sum var ílatin eina bláa ketilsdrakt og húgvu.

-jm

